# VIÐTØKUR FYRI FØROYA TÓNLEIKARAFELAG

**Navn felagsins og heimstaður**
**§1.**
Navn felagsins er Føroya Tónleikarafelag, og heimstaður tess er har limir felagsins eru.

**Endamál**
§2.
Føroya Tónleikarafelag er meginfelag fyri allar føroyskar tónleikarar, ið ynskja at vera við í felagnum. Felagið er myndað av tónleikarum, og virkar til frama fyri áhugamálum limanna.

**Limaskapur**
§3.
Allir limir í felagnum sambært §2 eru skrásettir beinleiðis í Føroya Tónleikarafelag.
Felagið samstarvar við onnur tónleikafeløg í landinum, og tað stendir limum felagsins frítt at vera limir í øðrum tónleikafeløgum eisini.
Leiðslan í felagnum hevur skyldu til eina ferð árliga, í minsta lagi 2 mánðair undan aðalfundinum, at dagføra limalistan og gera vart við møguliga eftirstøðu.

**Aðalfundur**
§4.
Aðalfundurin er evsta vald felagsins. Atkvøðurætt hava allir limir felagsins, sum ikki eru í eftirstøðu í limagjaldi. Atkvøðurættur kann verða framdur við fulltrú. Fundarstjórin avgerð gildi hennara.
Aðalfundir verða hildnir har, ið nevndin avgerð at halda fund. Ársaðalfundur skal verða hildin, áðrenn apríl mánaði er úti.
Nevndin boðar til fundar við í minsta lagi 14 daga freist í almennum miðili við tilskilan av fundarstaði og tíð. Eru uppskot at viðgera, ið til samtyktar krevja serligan meiriluta, skal hetta vera tilskilað í fundarboðunum.
Uppskot frá limum skulu, fyri at koma til viðgerðar á vanligum aðalfundi, vera nevndini í hendi innan 1 viku áðrenn fundin. Fullfíggjað fundarskrá skal verða lýst í seinasta lagi 2 dagar undan aðalfundinum.

**§5a.**
Á ársaðalfundi skulu fundarevnini vera hesi:
a) Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári.
b) Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar.
c) Val av grannskoðara
d) Val av nevndar- og tiltakslimi.
e) Áseting av limagjaldi
f) Uppskot frá nevnd ella limum, um nakað er

§5b.
Aðalfundurin velur eftir uppskoti frá nevndini ein fundarstjóra. Hann kann vera nevndarlimur.
Fundarstjórin stýrir fundinum og tekur samanum allar spurningar viðvíkjandi viðgerð av málum og atkvøðugreiðslu.

§5c.
Á aðalfundi verða samtykt uppskot, ið standa á fundarskránni og broytingaruppskot teirra.
Mál til viðgerðar á aðalfundi verða avgjørd við vanligum meiriluta uttan so, at lógir ella hesar viðtøkur krevja serligan meiriluta.
Til at samtykkja avgerðir um broyting av viðtøkunum og avtøku av felagnum krevst í minsta lagi, at 2/3 av limunum eru umboðaðir á aðalfundi, og mega tílíkar samtyktir verða samtyktir av 2/3 greiddum atkvøðum.
Eru 2/3 av limunum ikki umboðaðir á aðalfundi, men uppskotið annars hevur fingið 2/3 av greiddum atkvøðum, boðar nevndin áðrenn ein mánaður er liðin til eykaaðalfund, og á hesum fundi kann uppskotið verða viðtikið við 2/3 av greiddum atkvøðum, sama hvussu nógvir limir eru møttir.

§7.
Eykaaðalfundir verða hildnir eftir avgerð nevndar- ella aðalfundarinnar, ella tá ið minst 1/4 av limunum skrivliga krevja tað. Boðað verður til eykaaðalfundar innan 14 dagar eftir, at skrivlig áheitan er nevndini í hendi.

§8.
Frásøgn frá tí, ið gjørdist á fundi, verður ført í fundarbók. Bókin, sum nevndin hevur góðkent til hetta, verður at undirskriva av fundarstjóranum og hjástøddum nevndarlimum.

## Nevndin

§9.
Felagið verður stýrt av einari trýfólka nevnd, ið skipar seg sjálv við formanni, skrivara og kassameistara.
Nevndarlimir sita 2 ár í senn. *Ein* limur verður valdur stakár og *tveir* makaár.
Á hvørjum árið, verður eisini ein tiltakslimur valdur. Tiltakslimurin er tann, ið fær flestar atkvøður eftir valdu nevndarlimirnar.Tiltakslimurin situr eitt ár í senn.
Verður talið á nevndarlimum í árinum minni enn tríggir, við tað at at ein ella fleiri fara burturúr, skal nevndin sum skjótast fullmanna seg, fyrst við tiltaksliminum. Um onkur afturat fær forfall, má nevndin kalla inn til eykaaðalfundar til val av nevndarlimi.

§10.
Felagið verður teknað av samlaðu nevndini. Við keypi, sølu og veðseting av føstum ognum krevst aðalfundarsamtykt. Felagið heftir einans við ognum sínum.

## Roknskaparár

§11.
Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

## Limagjald

**§12.**

Á hvørjum ársaðalfundi verður limagjaldið ásett. Allir limir hava skyldu at gjalda mánaðarligt limagjald. Um ein limur er í eftirstøðu við limagjaldi, hevur viðkomandi ikki atkvøðurætt á aðalfundinum. Fer eftirstøðan útum 1 ár, kann limur verða strikaður úr felagnum.

## Um at taka felagið av

**§13.**

Um umstøðurnar krevja, at felagið verður tikið av, eigur nevndin at seta fram uppskot um hetta á ársaðalfundi ella eykaaðalfundi. Til hetta krevst serligur meiriluti sí §5c Aðalfundurin skal samstundis taka støðu til, hvat skal verða av ognum felagsins.

Soleiðis samtykt á dagførandi aðalfundi
Tórshavn, tann 7.mars 2018